**Leiðbeining um loyvi at skjóta grágás og brandgás**

**1. Leiðbeiningin fevnir um**

1.1. Henda leiðbeining hevur til endamáls at greiða frá treytunum fyri at fáa loyvi at skjóta grágás og brandgás, sum hevur sett seg á velt lendið og elvir til skaða har, soleiðis sum heimilað sbrt. ásetingunum í § 17a í Løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin).

1.2. Heimildin at skjóta grágás og brandgás er tíðaravmarkað og fer úr gildi aftur 1. januar 2031.

**2. Loyvi at skjóta grágás og brandgás**

2.1. Búnaðarstovan kann veita umsøkjara tíðaravmarkað loyvi at skjóta grágæs og brandgæs, um umsøkjarin hevur grundaðar trupulleikar av, at tær seta seg á størri velt lendi.

2.2. Loyvi skal latast ávísum persóni. Loyvi kann ikki latast einum felag. Loyvishavarin kann lata heimildarfólkum sín rætt, treytað av, at hesi eisini lúka treytirnar fyri at fáa loyvi.

2.3. Loyvið at skjóta skal latast fyri eitt ávíst tíðarskeið, sum er styttri enn til 1. januar 2031.

2.4. Loyvið kann verða avmarkað til ávís tíðarskeið á árinum, tá ið trupulleikin er størstur, og til teir partar av landinum, har trupulleikarnir eru staðfestir.

2.5. Búnaðarstovan kann eftir nr. 4 leggja treytir við loyvinum.

2.6. Loyvið at skjóta grágæs og brandgæs verður ikki latið á almennum frílendi, lendi kring bygningar í bygdum øki og onnur smærri jarðarstykki, har trygdin kann verða sett í vanda.

**3. Umsókn um loyvi at skjóta grágás og brandgás**

3.1. Umsøkjarin skal brúka umsóknarblað frá Búnaðarstovuni, tá søkt verður um loyvi at skjóta grágæs og brandgæs. Sama umsóknarblað skal brúkast, um heimildarfólk skulu hava loyvi.

3.2. Lendið skal eyðmerkjast við kortskjali, matrikulnummari og markatalsbygd.

3.3. Umsøkjarin skal lýsa tað velta lendið, t.d. um talan er um nýveltan, nýsáddan ella friðaðan bø, og skal greiða frá, hvussu stórur trupulleikin er. Trupulleikin kann eitt nú lýsast við tali av gásum, títtleika og longd á tíðarskeiði, har nevndu gæs seta seg á velta lendið.

**4. Loyvistreytir**

4.1. Tað er ikki loyvt at skjóta grágás ella brandgás, sum liggur á eggum ella gongur við ófloygdum ungum.

4.2. Tað er ikki loyvt at brúka lokkifugl fyri at fáa gæs at seta seg á bøin.

4.3. Villgæs eru friðaðar eftir fuglaveiðulógini, og tí krevst serstakt loyvi at skjóta Grágás og Brandgás (soleiðis eita sløgini), sum elva til skaða í veltum lendi. Loyvishavarin og heimildarfólk hansara skulu tí tryggja sær, at tað bara eru grágæs og brandgæs, ið verða skotnar. Búnaðarstovan ger vegleiðing um hetta, sum umsøkjarin váttar at hava kunnað seg við.

4.4. Loyvishavarin skal í seinasta lagi 15. januar boða Búnaðarstovuni frá, hvussu nógvar gæs eru skotnar árið fyri. Loyvishavarin skal eisini greiða frá nær og hvar, grágæsnar eru skotnar. Loyvið fellur burtur, um henda fráboðan ikki verður latin Búnaðarstovuni innan freistina.

4.5. Búnaðarstovan kann í loyvinum seta nærri treytir um reglur fyri tryggum og hóskandi veiðihátti.

**5. Eftirlit**

5.1. Politiið hevur eftirlit við, at løgtingslóg og treytirnar í loyvinum verða hildnar.

**6. Henda leiðbeining kemur í staðin fyri**

Henda leiðbeining kemur í staðin fyri reglugerð frá 21. juni 2021 um tíðaravmarkað loyvi at skjóta grágæs sambært lóg um fuglaveiðu v.m.